# TILTØK

**Gudstænastur – Trinitatis sunnudag**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Sonja Klein
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Heri Joensen. Gentukórið í Meinigheitshúsinum luttekur
***Gøta:*** kl. 11, familjugudstænasta, Martin R. Jacobsen (barnakór luttaka), øll verða boðin til kirkjukaffi frá kl. 9–
***Gjógv:*** kl. 11 messa Emil Olsen.
***Funningur:*** kl. 12.30 messa Emil Olsen.
***Selatrað:*** kl. 11, altargongd, Jógvan Fríðriksson
***Norðskála:*** kl. 11 Jónsvein Bech
***Hósvík:*** kl.11.00, Inga Poulsen Dam
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Magnus Brahé Jørgensen
***Skálavík:*** kl. 12, Jákup R. Hansen
***Skúvoy:*** kl. 12, Uni Næs
***Mykines:*** kl. 14, altargongd, David Johannesen
***Hov:*** kl. 12.00, Patrick de Neergaard
***Leiti:*** kl.12.00, Patrick de Neergaard

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Sunnudagin 3. juni kl. 12.00 Felags útferð til Tjørnuvík: Beint eftir gudstænastuna verður felags útferð gjørd til Tjørnuvík fyri bæði børn, ung og vaksin. Bussar og bilar koyra. Bygdarhúsið er tókt, har fólk kunnu fáa ein heitan munn og okkurt gott afturvið. At hava við: Ein góðan matpakka. Til børnini: Sunnudagsskúli verður hildin kl. 14.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin 3. juni:
Kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30: Samvera við drekka
Kl. 12.00: Sunnudagsskúli og møti. Benny Drewsen, talar. Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**Havnar kirkja**
***Aftankvirra***
Fríggjakvøldið 1. juni frá kl. 21.00 – 23.00. Kl. 22.00 syngur Katrina Petersen. Kl. 22.30 andakt.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Kl. 11 gudstænasta J.V. Danielsen.

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti*
Fríggjadagin kl 07.00 bøn.
Sunnudagin kl 14.00 familjuguðstænasta barnakórið luttekur
Mánakvøldið kl 20.00 felagsbønamøti í Oasuni
Verið hjartaliga vælkomin.
*www.oasan.fo*

**Lívdin**
*á Brekku 3*
Fríggjakvøldið kl. 20 ungdómsmøti har Søren Joensen og Leivur Ragnarson tala.
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti.
Kl. 11.30 samfelagsløta
Kl. 12 tilbiðjunarmøti.
Undir báðum møtinum er barnaansing fyri børn undir skúlaaldur.
Kl. 12 Sunnudagsskúlin.
Møtini kunna hoyrast beinleiðis á www.livdin.fo
Týskvøldið kl. 20 Bøn og bønarskúli.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Kl.12 Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið krl 18.00 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Ebenezer**
Fríggjadag
kl. 22.00 Mentunarnátt - Sangkórini úr Ebenezer, Betesda og Siloa luttakað
Sunnudag
kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 18.00 Evangeliskt møti.
- Talari: Óli Steinberg
Mánadag
kl. 12.30 Andakt
Heimasíðan: *www.ebenezer.fo*

**Meinigheitshúsið í Havn**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v. Hera Kjærbo, evni: Ábyrgd og missión, Meinigheitskórið syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Leygardagin kl. 19.30 Flare Chill Out, kl. 23.00 úti-Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 Møti - Tummas Jacobsen talar, kl. 11.30 sunnudagsskúli.
Mánadagin kl. 20 Felagsbøn í Oasuni
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Fríggjadag byrjar skótalegan á Selatrað. Sunnudag frá kl. 11 er sunnudagsskúlin og øll sum ynskja at verða við til Familjutíman á Selatrað kl. 16,00, vælkomin. Møguleikar at grilla og verða við til postarenning og forðarenning.
Møti í salinum kl. 11,00. Suppa, sápa og frelsa síðan 1865.
*www.frelsunarherurin.fo*

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl 18 evangeliskt møti, Thorkil Jørgensen talar um fongsulsmissión í Rumenia, kl. 22 útimøti á Vaglinum.
Mánakvøldið 4. juni kl. 20 felags bønarmøti í Oasuni.
www.gospel.fo

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin 03 /06 evangeliskt møti klokkan 18.

**Saron Haldórsvík**
Mánadagin 4. juni húsmøti hjá Kirstin og Eirik Samuelsen, klokkan 20
Verið hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 18.00. Hesir luttaka við sangi og talu: Hans P. Højgaard, Sigfred Johannesen, Thomas J. Askham, Torbjørn Láadal og Steintór Hjaltalin. Øll eru vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.00 og møti kl. 18.00
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Sjómanskvinnuringarnir á Strondum og Skála**
fara útferð til Suðuroyar sunnudagin 10. juni.
Tey, sum hava hug at koma við, verða biðin um at siga frá á tlf. 44 72 57 ella 44 11 90 áðrenn 7. juni.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin 3. juni kl 13.30 Sunnudagsskúli og kl 19.00 møti við Jørmund Foldbo. Evni: Gevaratænasta. Innsamling til húsið. Aftaná verður drekka og hugnalig samvera.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21: AWAKE við Thorkil Jørgensen úr DK.
Sunnudagin kl. 11: Morgunmøti við Paula Høj, evni: samkoma- og leiðsla. Barnamøti kl. 11.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Um vikuskiftið hava vit vitjan, har tveir brøður í Harranum, frá Benin koma at tala. Tulkur verður til øll møtini.
Fríggjadagur 1. juni kl. 20:00 møti.
Leygardagur 2. juni kl. 22:00 møti.
Sunnudagur 3. juni kl. 14:00 sunnudagsskúli.
kl. 18:00 møti.
Mikudagur 6. juni kl. 20:00 bíbiltími.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Sudanringurin kemur saman týskvøldið 5. juni kl. 19.00.
Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl 13.30 verður sunnudagsskúli,
kl 18 verður møti við Erik Wengel frá DEM og
kl 21 ungdómsmøti við Sylverius Jacobsen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagsskúlin verður sunnudagin kl. 13.30, og blákrossmøti verður sunnukvøldið kl. 18, har Alfred Olsen talar yvir evnið "Hvør er næsti mín?". Manskórið í Thabor syngur. Innsavnan til Bláa Kross.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.
Meinigheitsfundur verður sunnukvøldið kl. 18. Leivur og Bjartur vitna. Offurgongd, barnaansing og drekka aftaná.

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Thorkil Jørgensen talar um fongsulsmissión í Rumenia.
Mikukvøldið 6. juni kl. 20 undirvísing og bøn.
Hóskvøldið 7. juni kl. 20 ungdómsmøti.

**Sands Missiónshús**
Sunnudagsskúli sunnumorgunin kl. 10.30.
Møti kl. 18.00. Sangur við Sølva, Egin og Terja. Tú ert vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Sunnudagn kl. 17.30: Bøn & lovsangur.
Sunnudagin kl. 18.00: Møti.
Øll eru vælkomin.

**Vitnið, Hvalba**
Vegna sjónvarpsupptøku verður evangeliska møtið sunnudagin kl. 15.00.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Vegna suðuroyarlegu í Nesvík verður einki møti sunnukvøldið.

**Missiónshúsið í Vági**
Møti sunnukvøldið kl. 18.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardag kl. 15.00: Andakt í ellisheiminum á Tvøroyri. Kl. 16.10: Andakt í sambýlinum á Tvøroyri.
Sunnudag kl. 11.00: Halgunarmøti. Kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Kl. 17.30: Bønarløta. Kl. 18.00: Evangeliskt møti. *www.frelsunarherurin.fo*

**Getsemane, á Brekku 19**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við André Matras
Leygardagin kl.10.00 er morgunbøn
Sunnudagin kl.14.00 er møti við Werner og Hannegrethu Thomassen, sunnudagsskúli er samstundis
Hvønn gerandismorgun kl.6:15 er morgunbøn.

**Soli Deo Gloria**
Leygakvøldið kl 22.00 útimøti í Vágstúni. Mánakvøld kl 20.00 bønarmøti.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjakvøldið 1. juni kl. 22 Opið Hús.
Leygarkvøldið 2. juni kl. 24 Café v/ livandi tónleiki, suppu o.ø.
Sunnudagin 3. juni kl. 14 Sunnudagsskúli(eftir skrúðgonguna).
kl. 18 Møti v/ Mikkjal, Suna, Ólavur og fleiri.
Kl. 21.00 Ungdómsmøti v/ Erik Wengel.

**Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR**
sunnudagin 3. juni verður gongutúrur: Leynavatn, niðan undir Bøllufjall og suður móti Árnadalstind. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10. Havi góð og heit gongukløðir og matpakka við. Túrurin er tungur og gingið verður 4-5 tímar. Tilmelding.

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl. 17 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
**Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Sunnudagin 3. juni verður farið niðan á Malinstind (Vágoy). Vit møtast kl. 14 við Kommunuskrivustovuna í Sandavági. Túrurin er miðal/tungur.
*Eysturoyar gongufelag*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Fríggjadagin 1. juni***
kl. 10-14 Opið hús
***kl. 14-20 Mentanarnáttin. Húsið verður opið fyri almenninginum. Drekkamunnur og pannukøkur og søla av handbundnum pløggum á miðhæddinum í Tilhaldinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.***
***Mánadagin 4. juni***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17: Kortspæl, telving, landastrok, kánus o.o. spøl
***Týsdagin 5. juni***
Grundlógardagur, STONGT
***Mikudagin 6. juni***
kl. 10-12: Tóvirkið (veving, maskinbinding, seyming, binding o.a. Ása, Margit, Katrin, Marita og Marita. Fyrireiking til tað vit fara at gera í heyst
kl. 15.00: *»Likamsrørsla er av alstórum týdningi fyri at betra um fólkaheilsuna«* (AHR). Njótið hetta saman við okkum. Vit ganga. Møti stundisliga. Ganga eftir Villingardalsvegnum (Elisabeth/Randi, fysioterapeutar)
***Hósdagin 7. juni***
kl. 10-11.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-16: Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 8. juni***
kl. 10-11: Opið hús
kl. 11-12.00: Vitjan av Bill Thomas, serlækna í geriatri (ellilæknafrøði) - skipan av framtíðareldrarøkt eftir hugtakinum Eden Alternativ
kl. 14-17: Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið Hugnin**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks. Øll eru vælkomin.
Mánadagin 4.juni fara vit útferð undir Vestmannabjørgini. Vit fara úr tilhaldinum kl 9.45. Vit eta døgurða á fjørðukrónni í Vestmanna kl. 12.00 og fara undir Vestmannabjørgini kl. 14. Eisini er møguleiki fyri bara at fara til Vestmannar uttan at fara undir Vestmannabjørgini. Vit fara suður aftur av gomlurætt kl. 17.15. Tilmelding á tlf. 211921. Kostnaður 350,00 kr. Mikudagin 6.juni. Vit práta um túrin í Vestmanna.

**Landsfelag Pensjónista**
Felagið heldur til í Tróndargøtu 13, Tórshavn. Skrivstovan er opin hvønn týsdag frá kl. 13.00-16.00. Tlf. 319394 ella 219394.
LP@email.fo

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Skrá viku á viku 23:
Mánadagur 4. juni. Fimleikur. Felagssangur.
Týsdagur 5. juni. Vit fáa vitjan úr Oyndarfirði. Sigurd Joensen fer at siga frá um sjólívið, og lærir okkum at gera tólvtráðaband.
Mikudagur 6. juni. Opið hús.
Hósdagur 7.juni. Opið hús.
Fríggjadagur 8. juni. Boccia.
Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks, somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.

**Tilhaldinum á Toftum**
Tilhaldið á Toftum er vanliga opið týsd, mikud og hósd. kl 15-18
Týsd. 5. juni, Grundlógardagin er stongt
Mikud.6. juni Sangur við Martin Restorff Jacobsen,
Hósd 7. juni Stongt vegna skeið

**Dagtilhaldið Vesturskin**
***Opið er týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.***
***Týsdag*** - fimleikur
***Mikudag*** - Sangløta.
***Hósdag*** - ymist ítriv.
*Allar dagar er møguleiki at lesa bløðini og fáa sær ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Dagtilhaldið er opið Hvønn týsdag og hósdag frá kl.15-18, hósdagin 31.05.07. fara vit at vitja Dagtilhaldið á Glyvrum. Vit koyra við persónbilum frá Pensionistahúsinum kl 15.00, sig frá um tú vilt koyra við á tlf.232759.